# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kristian Sune Høgnesen føroyameistari í billard



*Teir tríggir klaksvíkingarnir, Kristian Sune Høgnesen, sum gjørdist Føroyameistari, Sonhard Johannessen, sum vann silvur og Hallur Joensen, sum vann bronsu.*

**Tað var ikki nóg mikið at vinna føroyameistarskapið fyri lið í billard. Hann vildi eisini vinna størstu billardkappingina í árinum, FM fyri einstaklingar. Tá avtornaði vann Kristian Sune Høgnesen ein tryggan sigur og gjørdist FM meistari fyri triðju ferð**

**BILLARD**

Kúlur rullaðu og keylur fullu sum sjáldan áður, tá nakrir av frægastu billardspælarunum í landinum møttust til FM dyst í Klaksvík um vikuskiftið. Enn ein føroyameistarakapping stóð á skránni og enn einaferð var tað Klaksvíkar Klubbi við Klaksvíkar Billardfelag, sum stóð sum vertur við tí heimliga vinnuvirkinum, Føroya Bjór sum sponsor.

Átta mans úr Havn og Klaksvík luttóku í kappingini, og tá avtornaði, vunnu klaksvíkingar bæði gull, silvur og bronsu. Føroyameistari gjørdist Kristian Sune Høgnesen. Hann vann ein rættiliga tryggan sigur á einum av veteranunum í billard, Sonhard Johannessen. Og í hølunum á teimum kom fyrrverandi føroyameistarin, Hallur Joensen, eisini úr Klaksvík. Hann kom sum ein komet inn á føroyska billardpallin í fjør og vann FM heitið fyrstu ferð hann luttók í kappingini. Hallur, sum í longri tíð hevur brúkt nógv av síni frítíðarorku uppá at spæla inn fløgu í Nashville í USA, hevur tí ikki havt neyðugu tíðina til billardvenjing.

Kappingin gjørdist rættiliga spennandi, tá teir báðir garvur klaksvíkingarnir, Kristian Sune og Sonhard fóru til borðið í finaluni. Tað stóð á jøvnum heilt til hálvleik, og eisini í byrjan av seinna hálvleiki megnaði Sonhard at halda tørn og ikki sleppa tí treiskna og stigtystandi Kristian Suna avstað.

Tó at Sonhard vísti gott spæl alla kappingina, so megnaði hann ikki at halda fast í tí tigandi men miðvísu billardkempuni, Kristiani Suna. Tá tað byrjar at rulla hjá honum, so er hann sum ein villur hestur, sum eingin fær tamt. Kúlurnar rulla elegant og ein keyla fyri og onnur eftir má lúta. Henda FM kappingin vísti, at Kristian Sune hevur uppborið at gerast føroyameistari fyri triðju ferð. Hann er uttan nakran iva besti spælari í landinum. Bert Henrik Petersen megnar at taka hann, tá tað stendur á. Henrik hevur tó ikki verið við í nøkur ár.

Hóast støðið sum heild hevur verið størri áður, so



*Í miðjuni Kristian Sune Høgnesen og Hallur Joensen, úr Klaksvíkar Billardfelag, sum vunnu gull í liðkappingini, vm. Jan Müller sum saman við Steinbirni í Dali, Mimir vann silvur og hm. Árant Berjastein, sum vann bronsu saman við Njál Petersen, úr Fuglafjarðar Billardfelag*